Fylgiskjal 5

FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Mentamálaráðið
Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn

Tórshavn 1. juli 2019

Okkara tilv./Our ref.:
4989-3744/Niels/Mentam-FAG-B-V
Tykkara tilv./Your ref.:

## Viðmerkingar til granskingarlóg

Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) takkar fyri møguleikan at ummæla uppskot til løgtingslóg um ráðgeving og stuðul, gransking, menning og nýskapan.

FAG skal gera vart við, at stórur munur kann vera á viðgerðina av umsóknum til gransking og á umsóknum til menningarverkætlanir. Munur kann eisini vera á stuðulsskipanum til einstakar verkætlanir og stuðulskipanir til rakstur av granskingarstovnum og -feløgum.

Eisini hevur tað týdning, at frammanundan vælvirkandi stuðulsskipanir kunnu halda fram, uttan at umsitingin av hesum verður ov tung.

Tí tekur FAG undir við, at tað í hvørjum einstøkum føri verður mett, hvørt ein ítøkilig stuðulsskipan skal leggjast til felags fyrisitingina, ella hon framhaldandi skal virka sum sjálvstøðug skipan.

Annars hevur FAG ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

Vinarliga
Føroya Arbeiðsgevarafelag

Niels Winther